FÖROYA LÖGMAÐUR

Uttanríkisdeildin
1 mars 2007
Mál: 860-001/07

Uttanríkisráðharri starvandi
Jón Sigurðsson
Rauðarárstíg 25,
105 Reykjavík
Ísland

Harri Uttanríkisráðharri,

Eg loyvi mær at vátta bræv tygara dagsett hin 21. februar 2007 , sum ljóðar soleiðis:

"Eg loyvi mær at vísa til samráðingar millum íslendskar og føroyskar myndugleikar um fiskiveiði í íslendskum og føroyskum sjógvi í 2007.

Eg havi skilt, at semja er vorðin um fylgjandi:

**"Semja**
**millum Ísland og Føroyar**
**um fiskiveiði í íslendskum og føroyskum sjógvi í 2007.**

**1. gr.**

Veiðuheimildirnar hjá føroyskum nótaskipum í lodnuvertíðini 2007/2008 verða 30 túsund tons, um heildarlodnukvotan er 500 túsund tons ella meir. Er heildarkvotan minni enn 500 túsund tons, verður parturin hjá føroyskum skipum 5% av heildarkvotuni.

Loyvt er føroyskum skipum at landa veiðina til framleiðslu í Íslandi. Uttan fyri Ísland er loyvt at landa til matna ella at virka til matna um borð á føroyskum verksmiðjuskipum innan fyri 2/3 av føroysku kvotuni, sbr. 1. grein. Eftir 15. februar skal ikki meira enn 1/3 av føroysku kvotuni fara til matna uttan fyri Ísland.

Føroyskum skipum er í lodnuvertíðini 2007/2008 loyvt at veiða upp til 10.000 tons av lodnu í hvørji vertíð í íslendskum búskaparøki við veiðiheimildum, sum eru fingnar við samráðingum millum Føroyar og Grønland.

**2. gr.**

Føroyskum skipum er loyvt at veiða svartkjaft og várgýtandi norðhavssild í íslendskum búskaparøki í 2007. Eftir samráðingar við landsstýrið í Føroyum kunnu íslendskir myndugleikar áseta mest loyvda skipatal, sum kunnu veiða samstundis á leiðini.

Tinganes · FO-100 Tórshavn · Føroyar
Tel.: (+298) 351010 · Fax: (+298) 351015 · t-postur: info@tinganes.fo · www.tinganes.fo

FÖROYA LÖGMAÐUR

**3. gr.**
Íslendskum skipum er loyvt at veiða svartkjaft og várgýtandi norðhavssild í føroyskum sjógvi í 2007. Tó kunnu ikki fleiri enn 12 skip verða á svartkjaftaveiðu samstundis í føroyskum sjógvi. Føroyar skila sær rætt til at avmarka talið av íslendskum svartkjaftaskipum, um tað gerst ov trongt á fiskileiðunum. Eftir samráðingar við íslendskar myndugleikar kann Føroya landsstýri áseta mest loyvda tal av skipum, sum kunnu veiða samstundis eftir norðhavssild.

**4. gr.**
Íslendskum skipum er loyvt at veiða upp til 1.300 tons av makreli í føroyskum sjógvi í 2007 og at veiða upp til 2.000 tons av sild úr øðrum sildastovni enn várgýtandi norðurhavssild.

**5. gr.**
Hvør partur fyri seg skal geva tveimum skipum, sum eru skrásett í landinum hjá hinum partinum, loyvi til royndarveiðu eftir tunfiski á sjóøki sínum í 2007.

**6. gr.**
Føroysk skip, sum veiða sambært hesi avtalu í íslendskum búskaparøki, skulu fylgja somu veiðireglum, sum galda fyri íslendsk skip um reiðskap og fiskileiðir. Íslendsk skip, sum veiða sambært hesi avtalu í føroyskum sjógvi, skulu fylgja somu veiðireglum, sum galda fyri føroysk skip um reiðskap og fiskileiðir. Skipum, ið veiða eftir svartkjafti, er ikki loyvt at hava reiðskap til botnfiskaveiði um borð.

**7. gr.**
Partarnir skulu fráboða ein lista yvir tey fiskifør, sum ætla at veiða á økjunum hjá hvørjum øðrum. Bert tey fiskifør, sum eru á hesum lista, hava loyvi at veiða á økjunum. Áðrenn fiskiskapurin byrjar, skulu avvarðandi myndugleikar hava boð um navn á skipi saman við øðrum upplýsingum av týdningi. Skipið skal boða frá, tá tað kemur á veiðiøkið, uppgeva knøttstøðu og veiðinøgd, sum er veidd, áðrenn komu á økið, og síðani uppgeva knøttstøðu og veiði hvønn dag. Tá skip fer av veiðiøkinum skal mett veiða verða givin upp. Nágreiniligari ásetingar um fráboðanir verða ásettar í kunngerð."

Um tygum staðfesta, at tað, ið stendur omanfyri, er í samsvar við fatan tygara, loyvi eg mær at skjóta upp, at henda avtala fær gildi fyribils, tá svarbræv tygara hesum viðvíkjandi er dagsett og endaliga, tá boðað er frá, at stýrisskipanarligu krøvini hjá hvørjum landi eru uppfylt."

Eg loyvi mær at staðfesta, at tað ið stendur omanfyri, er í samsvar við fatan Føroya landsstýris, og avtalan fær gildi fyribils í dag og endaliga, tá boðað er frá, at stýrisskipanarligu krøvini hjá hvørjum landi eru uppfylt.

Við hávirðing,

Jóannes Eidesgaard
løgmaður